

# Bygdarstevna á Strondum

Sunnudagin verður bygdarstevna á Strondum. Tað eru tað Stranda Ítróttarfelag og Strálan, sum skipa fyri, og er tiltakið til frama fyri ungdómsarbeiðið í bygdini. Stevnan skuldi verið 2. hvítusunnudag, men varð av serligum orsøkum avlýst.

Stevnan byrjar tó longu leygarkvøldið við stórum stevnuþingi. Um kvøldið verður dansur í Bygdarhúsinum fyri bæði tey yngru og tey eldru. Í Stórasali fer Rockwall at spæla og í kjallaranum fara Flemming og vinmenn at spæla góð danslög fyri tey meira tilkomnu.

Sunnudagurin byrjar við kirkjugongd. Kl. 15.00 verður kapproður 5-mannafør við gentum og dreingum og 6-mannaførini við kvinnum røgva 1000 m, meðan hinar bátsmanningarnar røgva 1500 m. Eftir kapproðurin verða onnur tiltøk uppi í Bygdarhúsinum sum t.d. tivoli, brotssparkskapping, eydnuhjól og mat- og køkutombola. Kl. 18.00 verður ein skemtidystur á tí nýggja fótbóltsvøllinum á Strondum. Málini eru júst sett upp, so hetta verður óivað fyrsti dysturin á hesum vøllinum. Kl. 19.30 verður barnadiskotek og tað verður ókeypis. Filmurin hjá Katrini Ottarsdóttir, »Maðurin, sum slapp at fara«, verður sýndur kl. 20.30. Filmurin hevur verið væl vitjaður bæði í Havn og á Strondum. Hetta verður seinasta sýningin á Strondum. Teir, sum hava hug at darta, sleppa eisini at royna seg. Kl. 21.00 verður snarkapping í dart. Ein fastur táttur á stevnuni nú í fleiri ár er »Syngið við« og byrjar hetta kl. 22.30. Sungið verður í matstovuni og endar stevnan við hesum tiltakinum.

*Løgmaður um Shell-ætlanina:*

# – Vit hava skyldu til at mótmæla

*-Vit mugu gera alt vit kunnu at forða Shell í at søkkja ein oljugoymsluпall við føroyska markið*

Tað er sera óheppið fyri okkum, ger Shell álvara av at søkkja ein av oljugoymslupallum sínum nær hendis føroyska fiskimarkinum. Vit mugu gera alt vit eru mentir fyri at forða hesum óskili.

Hetta sigur ein rættiliga avgjørdur løgmaður við Tíðindablaðið Sosialin, nú stórfyritøkan Shell ætlar at søkkja ein av sínum oljupallum sunnan fyri føroyska fiskimarkið.

Edmund Joensen sigur, at tað er ábyrgd okkara at gera alt fyri at forða fyri, at havið kring Føroyar, sum verður mett sum heimsins reinasta, nú fær eitt vanaligt umdømi.

Reina havið kring Føroyar hevur ómetaliga stóran psykologiskan týdning, tá tað snýr seg um at selja okkara fiskavørur.

Verður burturkast so sum tungmetallir og radioaktiv evni koyrt í havið stutt frá okkum, so er tað sera sera óheppið fyri okkum, og eg haldi tí, at føroyingar eiga at mótmæla.

Uppá fyrispurning um ikki landsstýrið átti at mótmælt søkking av burturkasti, eisini tá tað galt næstu grannar okkara, eitt nú við Norðsjógvin og ikki bara tá tað rakar okkum, sigur løgmaður, at hetta er helst rætt principielt.

– Har eru vit kanska so lítlir og tað eru so nógv onnur lond, sum vara av og sum mótmæla. Her hjá okkum hava vit rætt og slætt skyldu til at tala at. Tað er heilt natúrligt, at vit føroyingar taka málið upp og gera tað so kraftiga sum gjørligt.

Løgmaður heldur tað vera eitt gott hugskot, um tað eru føroyingar, sum taka stig til at fara út við skipi á leiðina, har pallurin skal søkkjast, og har gera vart við sína ónøgd.

jan



SER-TILBOÐ
÷50%
við vaksan av myndum
50x75 Fyrr 245.- NÚ 95.-
40x60 Fyrr 178.- NÚ 85.-
30x45 Fyrr 128.- NÚ 65.-
20x30 Fyrr 48.- NÚ 25.-
SMS FOTO & VIDEO
Postboks 1058 · 110 Tórshavn · Tlf. 19820

**Hús ynskjast til keyps í Havn**

Hús ynskjast til keyps miðskeiðis í Havn. Mugu vera í góðum standi. Prísuppskot uml. 700.000 kr.

Ætla tit at selja, skriva so til: Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn, undir

**Bill. mrk. A-1**

**Lívdin,** Dj. í Gellsgøtu 1

Opið er soleiðis: Mikukveld frá kl. 20–23, fríggjakveld og leygarkveld frá kl. 19.00 til 01.00, og sunnukveld frá kl. 19.00 til 23.00.
Aldursmarkið er 16 ár.



*Tað eru ikki evnini í Brent Spar, sum eru vandamikil, men sjálv ætlanin at søkkja hann so tætt hjá okkum, sigur Arne Nørrevang*

*Professari í lívfrøði um Brent Spar:*

# Føroyingar eiga at mótmæla harðliga

*- Vit liva av fiski, og tað verða lond sum Føroyar, ið verða harðast rakt, um søkkingar av eitt nú goymslupallum við eiturevnum umborð fara at vinda upp á seg, sigur Arne Nørrevang, professari í lívfrøði.*

Brent Spar verður spakuliga togaður á Rosamary Banka, har hann skal søkkjast. Shell er komið í harðan andróður av teirri vána umtalu, felagið hevur fingið, og í Føroyum, her oljuvinnan nærkast, harmast fólk um, at goymslupallurin kanska endar í dýpinum sunnan fyri fiskimarkið.

Ein teirra, sum heldur, at føroyingar avgjørdir eiga at mótmæla, at Brent Spar verður søktur, er Arne Nørrevang, professari í lívfrøði og ráðgevi hjá oljuráðleggingarnevndini í umhvørvismálum.

Hann sigur, at tað er sera óheppið, um Brent Spar fer í havsins djúpa favn, tí so er fordømi skapt, og fleiri oljufeløg kunnu tá koma og siga, at tey vilja søkkja sínar gomlu oljupallar.

Føroyingar eiga at vera vaknir í hesum málinum. Vit liva av tí, sum er í havinum, og tað verða lond sum vit, ið verða meinast rakt, um dálkingin av havumhvørvinum vindur uppá seg, sigur Arne Nørrevang.

Nógv verður gjørt burturúr, nú Brent Spar skal í havið, men Arne Nørrevang skilir ikki rættuliga, hví so nógv verður talað um tey evni, sum sigast vera umborð á Brent Spar.

Sagt verður, at 50 tons av olju eru umborð, men so smáar nøgdir forkoma ikki umhvørvinum, sigur hann.

Tað er ikki pallurin sjálvur, sum er størsta hóttanin móti umhvørvinum, men sjálv ætlanin, og henni eiga vit at mótmæla so harðliga, vit kunnu, bæði hjá Shell og gjøgnum danir, sigur Arne Nørrevang.

**Komur bretum væl við**

Hann heldur, at tann parturin í málinum, sum kann fara at fáa einamest burtur úr ósinginí um Brent Spar, eru bretar.

Teir hava nú í einum einstøkum máli møguleika at broyta ta illa umtoktu avgerð, ið loyvið til søkkingina er, og soleiðis kunnu teir siga umheiminum, at teir vildu verja umhvørvið kortini.

- Tað er ein róng mynd, um tað hendir, tí eitt nú kjarnorkuverkið Sellafield lekur framvegis geislavirkin evni út, og í aðrar mátar eru bretar ikki serliga penir, tá teir sleppa sær av við vandamikið burturkast, sigur Arne Nørrevang.

uni




*Pílurin høgrumegin vísir, hvar Brent Spar var staddur tíðliga í gjár norðan fyri Hetland. Pílurin vinstrumegin sýnir Rosemary bankan, har Shell hevur ætlanir um at søkkja umstridda goymslupallin skamt frá føroyska markinum.*

# Shell vil tingast um pallin

*Boykottini eru nú so umfatandi, at oljufelagið er til reiðar at tosa um søkkingina av Brent Spar*

Oljufelagið Shell er nú undir so hørðum trýsti, at tað bjóðar seg til at tingast um ætlanirnar at søkkja Brent Spar við Rosemary Banka.

Hetta upplýsti stjórin á hollendska Shell í gjáramorgunin.

Hann segði fyri hollendska sjónvarpinum, at hann kundi ímynda sær, at bretska stjórnin orsakað av altjóða trýstinum er til reiðar at taka málið til umrøðu av nýggjum.

Eftir at hollendski Shell-stjórin hevði verið á skigganum, var ein annar talsmaður fyri oljufelagið í fjølmiðlunum og segði, at hann var skelkaður av teimum boykottunum, sum eru settar fram móti Shell, og at tingingar verða um Brent Spar.

Hollendska Shell eigur 60 prosent av øllum oljufelagnum, og tað man hava sítt at siga, nú umboðini í Hollandi gera vart við seg.

Umhvørvismálaráðharrin í Hollandi, Margreet de Boer, og búskaparmálaráðharrin, Hans Wijers, hava sagt, at tey fara ikki at keypa bensin frá Shell, av tí at felagið ætlar at søkkja Brent Spar, og Greenpeace fer framvegis harðliga til verka við at mæla til boykott av ymsum slag.

uni

**Frá NORÐOYA KUNNINGARSTOVU**

Tey vælumtóktu

**FØROYAKVØLDINI**

byrja nú aftur í Klaksvík.



**Tað fyrsta verður**

**leygarkvøldið 17/6, kl. 19.00**

Danskir gestir vera við. Borðið verður dekkað við alskyns føroyskum mati. Føroyskt undirhald, sangur og føroyskur dansur er eisini á skránni.

Tekningartisti liggur á Kunningarstovuni.

**Norðoya Kunningarstova**